LANDSROYND 4. FLOKKUR

mai 2008

# Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir ímillum skrástrikurnar lisnir tvær ferðir. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Loyvt er næmingunum at hava við sær til royndina, orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í vanligu undirvísingini í føroyskum í 4. flokki).

Góða **Anna /** (anna@yahoo.com) /

Vit **hava tíma /** í teldustovuni beint **nú**, / og **vit** kunnu / **skriva bræv** til onkran,/ **sum** vit kenna. / So tí **vil** eg / **skriva** til tín. / **Tað** er / **langt** síðan, / vit frættu **frá tær**. / Eg dugi **so/** illa **at** skilja, /at **tú** ert so **/ langt** burtur, / heilt yviri í USA./ Mamma og **pápi** / og eg **hava** hugt í / **eitt** heimskort, / so nú **veit** eg, / hvar tú ert./ Nú **er** kortini / **stutt tíð eftir**, / til **tú** kemur / heim **aftur**. / Beiggi **er** / vaksin so **nógv**./ **Tað** verður / spennandi at **vita**, / um **hann** / kennir teg **aftur**, / tá ið **tú** kemur./ Hvat fært tú at **eta** har yviri? Eta **tit** sama mat / **sum her**? / Og hvat gert tú **eftir** skúlatíð, / **hevur** tú funnið / nakrar **vinir**? / Nú gleði **eg meg /** til summarfrítíðina./ **Tað** er **stutt /** tíð **eftir**, / og **tað** besta av øllum er, / at **tú** kemur heim./ Hevur **tú/** keypt **mær nakað**? / Beiggi sigur, / at **hann** / ynskir **sær** ein bil, / men **eg** kundi/ hugsað **mær / at** fingið / onkra **bók**, / tí so **kann** / eg **lesa** enskt, / tí **vit hava** / fingið enskt í skúlanum í **ár**.
Kanst tú **eisini** / keypa okkurt tyggigummi? / Pápi Lenu **hevur** verið í USA, / **og** tá/ keypti **hann** bubligummi. / Eg **fekk** eitt frá henni, / **tað** smakkaði so væl. / **Tað er ikki** / nógv nýtt hent **her**. / Eg **kann /** kortini siga **tær**,/ at Petur og tey, / **sum** búðu/ **við** síðuna av ommu, / eru flutt **til** Danmarkar at búgva. / Í kvøld eiga beiggi **og eg** / at gera døgurða. / Tað gleði **eg meg til**. / Vit hava **tað** / so **stuttligt**, / men **tað var** stuttligari, / tá ið tú vart **við**. / Í kvøld skulu **vit** hava knettir, / tí **tað** er / **so** lætt **at** gera./

Nú fari eg at **enda**. / **Hevur** tú onga teldu sjálv, / so **tú** kanst **skriva** / eitt **sindur** oftari?/

Kærar heilsanir/

systir tín/

**Bára /** (bara.nielsen@skulin.fo)/